

# Hug at ráðgeva í innlendismálum?

## Spennandi starv sum innlendisráðgevi á Løgmansskrivstovuni leyst at søkja

Vilt tú gerast partur av fjølbroytta og spennandi toyminum, ið ráðgevur løgmanni? So hava vit kanska rætta starvið til tín.

Toymið um løgmann er sett saman av dugnaligum ráðgevum innan búskap, løgfrøði og uttanríkispolitikk. Løgmansskrivstovan vil styrkja enn meira um toymið og leitar nú eftir dugnaligum starvsfelaga, ið kann ráðgeva um innlendismál.

**Vit bjóða**
Sum innlendisráðgevi verður tín fremsta uppgáva at fylgja við og ráðgeva løgmanni í ymiskum innlendismálum. Talan kann vera um ráðgeving innan eitt nú heilsuøkið, almannaøkið, vinnuøkið, útbúgvingarøkið, umhvørvisøkið ella samferðsluøkið. Tú verður somuleiðis bindilið millum Løgmansskrivstovuna og stjórnarráðini, ið varða av hesum økjum. Ein av uppgávunum verður eisini at samskipa fundir og átøk millum landsstýrið og Kommunufelagið.

Sum innlendisráðgevi umboðar tú Løgmansskrivstovuna í ymiskum verkætlanum, ið ganga tvørtur um stjórnarráðini. Tað verður somuleiðis tín ábyrgd at fyrireika nærlagda kunning um áleikandi mál, og at fyrireika teg væl upp á møguligar spurningar frá landsstýrisfólkum, Løgtinginum ella fjølmiðlum.

Sum partur av leiklutinum er somuleiðis møguleiki fyri, at tú, saman við búskaparráðgevanum á Løgmansskrivstovuni, fært ábyrgd av eigarapolitikkinum hjá landinum. Á hendan hátt verður tú bindilið millum partafeløg og grunnar, ið Løgmansskrivstovan varðar av.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni á master- ella kandidatstigi. Harumframt ímynda vit okkum, at tú:

· Hevur viðkomandi starvsroyndir frá almennari fyrisiting ella øðrum, ið kann sammetast
· Góðan kunnleika um politikk og samfelagsviðurskifti
· Hevur góð greiningarevni
· Ert ágrýtin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
· Hevur góðar munnligar og skrivligar samskiftisførleikar
· Hevur politiskt tev
· Dugir væl at samstarva og røkja sambond

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Ítøkiliga flokkingin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, hini stjórnarráðini og stovnar undir stjórnarráðunum. Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan.

**Umsókn**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsrensl og øðrum skulu sendast við telduposti til: **starv@tinganes.fo**

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin **31. mai 2023 kl. 12.00.**

Starvið verður sett 1. august ella eftir nærri avtalu. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Ynskir tú at hoyra meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, løgmansstjóra, á teldupost* ***johnr@tinganes.fo*** *ella telefon* ***555016.***